betri banki

Avtala um handil við fíggjarligum tólum

Navn		P-tal
Bústaður	Postnummar	Bygd/Býur

hevur í dag gjørt avtalu við Betri Banka, sum niðanfyri í felag verða nevnd partarnir. Partarnir hava avtalað fylgjandi treytir um handil við fíggjarligum tólum:

Endamálið við avtaluni

Endamálið við hesi avtalu er at áseta mest týðandi rættindi og skyldur hjá pørtunum í sambandi við:

- at Betri Banki veitir kundanum møguliga íløguráðgeving
- at Betir Banki avgreiðir ella umsitur ordrar frá kundanum uttan íløgu-ráðgeving.

Rættindi og skyldur hjá pørtunum eru tengd at, um kundin er flokk-aður sum detailkundi ella professionellur kundi.Betri Banki kunnar kundan um, hvussu hann er flokkaður við serstøkum brævi. Professionellir kundar fáa ikki somu verju sum detailkundar. Verður t.d. handlað við fíggjarligum tólum uttan íløguráðgeving, verður eingin meting gjørd av, um íløgan er gagnlig fyri professionella kundan.

Ein rød av fylgiskjølum hoyra til hesa avtalu, treytað av hvørji fíggjarlig tól, kundin ynskir at handla, eins og avgerð kundans um keypsháttt hevur ávirkan á, hvat avtalugrundarlag verður galdandi partanna millum. Sí nærri niðanfyri.

Betri Banki hevur heimild at nýta upplýsingar frá kundanum sum grundarlag fyri ráðgevingina. Broytast upplýsingarnar, ið eru nýttar sum grundarlag fyri íløguráðgevingina sambært hesi avtalu, hevur kundin skyldu til at kunna Betri Banka um hetta.

Handil við fíggjarligum tólum við íløguráðgeving ella ognarrøkt

Upplýsingar um kundan

Sum grundarlag fyri íløguráðgeving ella ognarrøkt, skal Betri Banki hava eina rød av upplýsingum um kundan, herundir:

- kunnleiki til og royndir á tí íløguøki, sum hevur týdning fyri serstaka slagið av íløgu ella tænastuveiting,
- fíggjarlig støða
- íløguendamál

Hesar upplýsingar er neyðugar fyri, at Betri Banki kann viðmæla kundanum best hóskandi virðisbrævahandilin og/ella tey hóskandi fíggjarligu tólini.

Um kundin ikki kunnar Betri Banka um nevndu viðurskifti, kann Betri Banki ikki veita íløguráðgeving ella ognarrøkt.

Førleikaroynd

Við støði í fráboðaðu upplýsingunum hevur Betri Banki skyldu at tryggja, at:

- kundin hevur tær neyðugu royndirnar og tann neyðuga kunnleikan til at skilja váðan við virðisbrævahandlinum ella ognarrøktini,
- kundin er fíggjarliga førur fyri at bera teir íløguváðar, sum eru tengdir at handlinum í tráð við íløguendamálið og at
- tann ítøkiligi íløguhandilin, sum verður viðmæltur ella framdur, lýkur íløguendamálið hjá kundanum.

Sum trygd fyri hesum, verður kundin biðin um at svara eini røð av spurningum, so greiða kann fáast á váðafýsni kundans við atliti til íløguna. Greiningin av upplýsingunum frá kundanum og Betri Banka verður kallað ein førleikaroynd.

Omanfyri standandi upplýsingar og førleikaroynd verða skjalprógvað við hesum fylgiskjølum:

- MiFID-test/førleikaroynd við upplýsingum um viðurskifti kundans (fíggjarlig støða, váðaprofilur v.m.)
- Íløguuppskot

Íløguuppskotið kann innihalda eitt tilmæli um íløgu í ítøkiligt fíggjarlig tól (íløguráðgeving).

Um uppskotið einans inniheldur eitt meirayvirskipað tilmæli um íløgur í ymisk sløg av fíggjarligum tólum, harundir eitt uppskot um sundur-býting av íløguni í hesi fíggjarligu tól, er talan ikki um íløguráðgeving.

Tá førleikaroynd er gjørd, verða fylgiskjølini ein samantvinnaður partur av hesi grundavtalu.

Gagnsemisroynd

Um kundin biður um at fáa avgreitt ella umsett eini boð viðvíkjandi kompleksum fíggjarligum tólum, heitir Betri Banki á kundan um at upplýsa sín kunnleika til og royndir á íløguøkinum, sum hevur týdning fyri hetta slagið av tænastu ella tað íløguøkið, ið kundin biður um. Enda-málið við hesum er at tryggja, at kundin skilur teir váðar, sum eru knýttir at hesum slagi av tænastu ella íløguøki.

Um Betri Banki metur, at tann íløgan ella tænastan, ið kundin biður um, ikki er gagnlig fyri kundan, hevur Betri Banki í sambandi við handilin skyldu til nágreiniliga at upplýsa kundan um hetta.

Gagnsemisroyndin verður bert gjørd viðvíkjandi detailkundum.

Handil uttan íløguráðgeving

Um eingin førleikaroynd er gjørd, kann Betri Banki ikki veita kundanum íløguráðgeving ella ognarrøkt. Í tíllíkum førum verður handlað eftir hesum reglum.

Ordrafremjing ("execution only")

Í sambandi við handil við fylgjandi fíggjarligu tólum, kann kundin – sjálvur og uttan at fáa íløguráðgeving og uttan at ein gagnsemisroynd verður gjørd - gera avtalu um og geva boð um handil við:

- Partabrøvum, sum verða handlað á einum skipaðum marknaði í Føroyum, í londum innanfyri ES ella í londum, sum ES hevur gjørt avtalu við um fíggjarliga økið, ella á einum samsvarandi triðja-landamarknaði,
- Tólum, tengd at peningamarknaðinum, lánsbrøvum og øðrum skuldartólum, sum ikki fevna um eitt avleitt tól.
- Partum í íløgufeløgum ella samsvarandi íløgustovnum, ið eru fevnd av fyriskipan hjá ESRáðnum nr. 85/611/EØS (UCITS)

Talan er bert um ordrafremjan, um kundin sjálvur gevur eini ítøkilig boð, og Betri Bankihevur tá skyldu til at fremja ordran eftir boðunum.

Henda støða kann bæði koma fyri við telefonsamrøðu ella persónligari áheitan frá kundanum til Betri Banka, umframt við, at kundin fremur handilin við fíggjarligum tólum umvegis Netbankan.

Kundin góðtekur, at handil sum bert er ein ordrafremjing, ikki áleggur Betri Banka nakra skyldu til at meta um gagnsemið á tí givna ella bjóðaða tólinum ella tænastuni, og at kundin tí ikki er fevndur av tí verju, ið fæst við at gera eina førleika- ella gagnsemisroynd.

Um kundin ynskir íløguráðgeving viðvíkjandi einari ítøkiligari íløgu, verður mælt til, at kundin setur seg í samband við Betri Banka.

Skattskylda
Vinningur og tap, sum kundin hevur av íløgum eru fevnd av kapital-vinningskattalógini og eru skattskyldug í Føroyum. Hetta er eisini galdandi um kundin hevur síni virðisbrøv í varðveitslu í eini hópgoymslu skrásett í navninum hjá Betri Banka. Betri Banki veitir ikki skattaráðgeving, og tí hevur kundin skyldu til at fáa sær neyðuga skattaráðgeving frá skattamyndugleika, grannskoðara ella øðrum.

Kostnaður
Tá ið handlað verður við fíggjarligum tólum, verður tann til eina og hvørja tíð galdandi kostnaðurin hjá Betri Banka álagdur.

Váði
Tá íløgur verða gjørdar, er møguleiki fyri vinningi eins væl og tapi. Kundin samtykkir at verða kunnaður um, at íløgur í fíggjarlig tól hava við sær vanda fyri tapi, millum annað orsakað av broytingum í virðu-num á teimum fíggjarligu tólunum, í gjaldoyrakursum ella í støðu útgevarans

Uppsøgn
Avtalan kann uttan ávaring skrivliga sigast upp av kundanum. Mót-tiknir, men enn ikki avgreiddir handlar, eru fevndir av avtaluni, til teir eru avgreiddir. Avtalan fer úr gildi av sær sjálvari við deyða, fráboðan um verjumál, húsagang ella aðra viðgerð av búgvi.

Betri Banki kann skrivliga uppsiga avtaluna við eini freist upp á 8 dagar.

Samskifti
Betri Banki samskiftir við kundan á føroyskum, um ikki annað er avtalað.

Fylgiskjal
Hesi fylgiskjøl eru partur av hesi avtalu:

- Handilstreytir fyri virðisbrøv
- Vanligu viðskiftatreytir hjá Betri Banka
- Goymslutreytir hjá Betri Banka
- Politikkur um áhugamálsósemjur
- Ordafremjingarpolitikkur

Fleiri fylgiskjøl (avtalur) kunnu vera partur av hesi avtalu alt eftir, hvørji ítøkilig fíggjarlig tól, kundin ynskir at nýta – eisini hesi fylgiskjøl eru ein samantvinnaður partur av hesi avtalu.

Betri Banki hevur heimild til at geva kundanum upplýsingar um vanligar treytir á heimasíðu síni.

Góðkenning kundans
Undirritaða/i váttar við hesum at hava lisið, skilt og góðtikið tær treytir, sum eru knýttar at hesi avtalu. Hetta er eisini galdandi fyri ta treytina, at Betri Banki hevur heimild til at handla uttanfyri ein skipaðan marknað, sum umrøtt í ordrafremjingarpolitikkinum. Við undirskrift niðanfyri vátti eg hesa avtalu og samtykki, at fylgiskjølini, ið hoyra til hesa avtalu – og sum ikki eru persónliga ætlað mær – kunnu latast mær umvegis heimasíðu bankans. Somuleiðis kann Betri Banki fráboða broytingar í treytunum á somu heimasíðu. Treytirnar kunnu til eina og hvørja tíð fáast á pappíri við at venda sær til Betri Banka.

Dagfesting

Undirskrift (kundi)